# Hús úr tundri í Saltangará

15 Mar 2010 - 11:00 by Leif Láadal (partur av grein)



Um nøkur fá ár fara tað at verða sett krøv til, hvussu nógva orku eini hús mugu brúka til upphiting. Hetta hevur havt við sær, at summir framleiðarar av byggitilfari seinastu tíðina eru byrjaðir at hugsa eitt sindur øðrvísi. Hugtøk sum lágorkuhús og enntá ”nullhús” eru frammi, og í flestu førum spælir tundur ein stóra leiklut.

Hesi húsini, sum eru um at vera liðug í Saltangará, eru bygd úr tí, sum eitur Quad Lock. Í stuttum snýr tað seg um at byggja tveir veggir upp við tundurkubbum, sum verða spentir fastir við sterkum plasthaldarum. Millum veggirnar verður so fylt betong. Útveggurin verður so viðgjørdur, soleiðis at hann tolir vætu (m.a. við einari membran og tveimum løgum av pussi).

Húsini í Saltangará eru frá fyritøkuni Kubbi (http://www.kubbi.info).

Tað verður meira og meira hugsað um bjálving í hesum døgum, og við húsum sum Quad Lock og líknandi, er mann farin so vítt sum at byggja øll húsini úr sjálvari bjálvingini, kann mann siga.

.

Fleiri myndir frá byggjárínum í Saltangará á:
http://www.kubbi.info/galleries/ql-runavik1/index.html

   